# Kunningartøkni í fólkaskúlanum

## FRÁGREIÐING OG TILMÆLI

KT-nevnd fólkaskúlans - mars 1998

## Innihald


**1 Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 3**

1.1 Kunningarsamfelagið
1.2 Støða skúlans í kunningarsamfelagnum
1.3 Uppaling og tøkni
1.4 Í eini endurburðartíð

**2 Tilnevning og arbeiðssetningur nevndarinnar . . 7**

**3 Verandi støða á KT-økinum . . . . . . . . . . . 9**

3.1 Inngangur
3.2 Spurnablaðskanning
3.3 Teldunýtsla og undirvísingarforrit
3.4 Undirvísingarførleiki
3.5 Nakrar viðmerkingar frá skúlunum
3.6 Royndir og verkætlanir
*Byrjanarundirvísing í lesing / Tess-samstarvið /*
*Umsett undirvísingarforrit / Sleipnir / Heimasíðukapping*

**4 Fortreytirnar fyri nýtslu av KT í fólkaskúlanum . 15**

4.1 Nýggja fólkaskúlalógin og leiðbeinandi lesiætlan
4.2 Tøkniligar fortreytir
4.3 Førleikakrøv lærarans
4.4 Partarnir
*Løgting, landsstýri og undirvísingarmálastýrið /*
*Kommunur og kommunufelagsskapir / Avvarðandi stovnar /*
*Áhugafeløg / Vinnulív / Miðnáms- og yrkisskúlar / Einstaklingar*

5 **Tilmæli nevndarinnar** . . . . . . . . . . . . . . . 21

5.1 Høvuðsmál
5.2 Lutmál
*KT-depil*
*Eftirútbúgving*
*Læraraútbúgvingin*
*Samskifti og skúlanet*
*Útgerð*
*KT-grunnur, menningarætlan v.m*
*KT í undirvísingini*
*Mentan og tøkni*
5.3 Uppskot til virkisætlan
5.4 Íløgu- og rakstrarætlan

6 **Samandráttur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

7 **Fylgiskjøl** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34

A Spurnablað
B Yvirlit yvir svar upp á spurningarnar 1-18
C Viðvíkjandi internet-sambandinum hjá skúlunum (des. 1997)
***Fylgiskjølini A,B og partur í C eru ikki við í PDF-útgávuni***
(eru í tí prentaðu útgávuni frá mars 1998)

D Hallgerð A. Hansen: *Hugleiðingar og viðmerkingar í sambandi við at brúka teldu í byrjanarundirvísingini í lesing*

# 1 Inngangur

## 1.1 Kunningarsamfelagið

Ásannast má, at við kunningartøkni – stytt KT – eru vit á veg inn í eitt broytt, annarleiðis samfelag enn tað, vit higartil hava havt, tað sokallaða kunningarsamfelagið. Tilbúgva vit okkum ikki til at liva í kunningarsamfelagnum, verða vit eftirbátar í mun til onnur samfeløg, sum vit skulu samskifta og samstarva við.

Við nýggju tøknini verða skaptir aðrir møguleikar bæði samskiftisliga og framleiðsluliga; størri fleksibilitetur innan vinnulív og tænastu. Og sjálvandi eiga vit sum samfelag at taka hesar møguleikar til okkara, samstundis sum vit eisini eggja fólki til at taka hesar tøkniligu møguleikar við í teirra arbeiði, t.v.s. at vit í okkara egna samfelagi eisini duga at gera nýtslu av KT bæði innan útbúgving, framleiðslu og samskifti.

Tað er torført at siga, hvørji fakligu førleikakrøvini verða í samfelagnum um 10 ár, nú vitanarnøgdin økist nógv skjótari enn frammanundan. Men tað slepst ikki uttanum, at í framtíðar samfelagnum fer KT at hava ein alsamt størri leiklut bæði sum vitanarberi og sum samskiftismiðil.

Framtíðar samfelagsmenningin verður í stóran mun treytað av møguleikunum, sum liggja í framkomnari tøkni og vaksandi nýtslu av hesi tøkni. KT gerst alt meira vanligt á almenna arbeiðsmarknaðinum, tí hon letur upp fyri øðrum møguleikum til at samskifta, leita, savna og senda upplýsingar og vitan við. Borgarin fær eina skjóta og lættari tænastu. Tað eru ongar darvandi tíðaravmarkingar, og landafrøðilig mørk eru ikki til innan hetta virkisøki. Fólk eru hvørki bundin av tíð ella staði – øll hava somu møguleikar at leita fram ella lata frá sær upplýsingar.

## 1.2 Støða skúlans í kunningarsamfelagnum

Ein avgerandi fyritreyt fyri framhaldandi menning av kunningarsamfelagnum er, at einstaklingurin ognar sær førleika, sum ger hann til ein virknan og kritiskan samfelagsborgara. Og her er tað, at fólkaskúlin hevur eina av sínum høvuðsuppgávum, t.e. *”at stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini”* (sambært endamálsorðing fólkaskúlans).

Umráðandi er, at allir næmingar skúlans fáa umstøður til at menna sín hug til lærdóm gjøgnum KT. Skúlin skal tí geva næmingunum møguleikar til at kunna seg við teldur og teldunýtslu, so teir síggja KT sum eitt týðandi fjøltáttað amboð: sum læritól í undirvísingini, sum eitt hent samskiftistól og sum eitt amboð til at ogna sær upplýsingar og vitan.

Ein týðandi táttur til at menna KT í skúlanum er støða lærarans. Ein vansi her er, at mangir lærarar, sum í dag starvast í skúlaverkinum, hava ikki dagførdan kunnleika á KT-økinum. Eisini er neyðugt, at komandi lærarar fáa høvi at ogna sær neyðugan kunnleika fyri eini støðugari KT-menning í skúlanum.

**Avgerðin um, at Føroyar skulu vera eitt kunningar-samfelag, er tikin. Tað, sum nú ræður um, er: Hvussu nýta vit møguleikarnar, sum liggja í kunningartøknini? – skúlanum og samfelagnum at gagni**

## 1.3 Uppaling og tøkni

Uppgáva skúlans er ikki bara kunnleikagevandi, men eisini uppalandi. Skúlans arbeiði er eisini at gera næmingarnar førar fyri at kunna viðgera vandamál við varsemi, t.e. ikki taka alt til sín uttan umhugsni. Serliga við KT er neyðugt, at skúlin ikki gloymir henda partin, tí tað er valla nakar ivi um, at tann stóra nøgdin av upplýsingum, sum er blivin tøk hjá øllum brúkarum, eigur eisini at síggjast í einum kritiskum ljósi.

Hinvegin má eisini ásannast, at KT hevur – í nógv størri mun enn nakar annar miðil – drigið gluggatjøldini frá, soleiðis at næmingarnir fáa atgongd til eitt alheims ”bókasavn” við misjavnum tilfari. Tað er umráðandi, at skúlin mennir næmingarnar og gevur teimum eitt haldgott støði at standa á, eins og Heðin Brú sigur í vígslukantatu læraraskúlans:

*”Gev honum bert trygt at standa á*
*og sláið so gluggarnar frá!”*

## 1.4 Í eini endurburðartíð

Rætt sum ein gandakallur hevði Gutenberg breitt kynstrið at prenta um alt Evropa. Fólk tóku hesa náðigávu til sín – ikki bert tey lærdu og múgvandi, men eisini almúgan. Fólk fóru at skoða lívið og tilveruna í nýggjum ljósi. Lunnar vórðu lagdir undir humanismu og almáttuga katólska kirkjan fekk mangar staðir mønustingin. Nýggjar tíðir, nýggir siðir.

Millum tey, sum í hesi endurreisingartíð skrivaðu seg í søguna, vóru ikki bert vísindafólk, men eisini listafólk. Endurreisnin og endurburðartíðin (renesansan) tekur støði í júst hesi samantvinning, har listin og vísindin umskarast. Fólk fáa eina nýggja heildarmynd. Í mangar mátar standa vit aftur fyri eini endurreisn – skúlin og samfelagið.

Mangt bendir á, at vit stevna móti eini samfelagsskipan, sum í alt størri mun fer at hava við sær eina fruktagóða samanrenning millum list og vísind. Ein skipan, har tørvur verður á fólki við tvørfakligari vitan og dugnaskapi. Uttan at missa høpi og heild, skal framtíðar menniskjað kunna arbeiða tvørtur um mark, bæði yrkisliga og mentanarliga.

Tað var sama hugsjón, ið myndaði endurburðartíðina – renessansutíðina. Menniskjan skuldi megna at samantvinna list og vísind. Tástani spurdist nakað skilagott burturúr.

Hetta er ein av stóru avbjóðingum skúlans í komandi tíðum.

# 2 Tilnevning og arbeiðssetningur nevndarinnar

Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum setti í skrivi, dagfest 25. august 1997, eina nevnd til at taka spurningin um kunningartøkni í fólkaskúlanum til viðgerðar, hereftir nevnd KT-nevnd fólkaskúlans. Setanarskrivið er soljóðandi:

*Kunningartøknin (KT) er nógv nýtt í londum rundan um okkum, bæði í vinnuni og í skúlunum. Her heima hjá okkum hevur vinnulívið tikið KT munandi meira til sín tey seinnu árini. Á fólkaskúlaøkinum hava nakrar kommunur gjørt íløgur í teldutøkni, meðan aðrar at kalla lítið og einki hava gjørt. Á teimum skúlum, sum hava fingið telduútbúnað, er ymist, hvussu nógv hesin útbúnaður hevur verið nýttur, og hvat er komið burturúr á tí pedagogiska økinum.*

*Sum ein avleiðing av hesum ynski um, at skúlin skal fylgja við menningini í samfelagnum, síggja møguleikar, skilja og taka lut í tí tøkniligu altjóðageringini, og at KT skal verða við til at menna og gera tað pedagogiska arbeiðið fjøltáttað fyri bæði næming og lærarar, hevur landsstýrismaðurin í skúlamálum gjørt av at seta eina nevnd at koma við tilmæli til eina virkisætlan um, hvussu útbreiðslan av nýtsluni av KT kann økjast munandi meira í fólkaskúlanum.*

*Arbeiðssetningur nevndarinnar er:*

1. *Kortleggja støðuna á KT-økinum í fólkaskúlanum í dag:*
   Hvussu nógvir skúlar hava umstøður til telduundirvísing?
   Hvussu nógvar teldur o.a. eru á hvørjum skúla?
   (um møguligt býtt upp í nýggjar (t.d.–>486) og eldri (<486 teldur)
   Hvussu nógv verður teldan nýtt til undirvísing, í hvørjum læru-greinum,og hvørjar skráir verða nýttar?
   Hvussu eru telduviðurskiftini skipað á skúlunum (upplæring/ undirvísing av lærarum, skeið fyri lærarum, røkt o.a.)?
2. *Fortreytir fyri KT í fólkaskúlanum,* m.a.:
   Fíggjarligar
   Tøkniligar
   Kunnleikastøði hjá lærarunum
   Krøv til læraraútbúgvingina
   (eftirútbúgving/skeið fyri lærarar o.a.)

3. *Hvussu eiga vit at bera í bandi fyri at koma munandi víðari (virkisætlan)?*
   Hvat skal gerast og av hvørjum, fyri at koma so langt sum gjørligt?
   Hvat kann gerast innan fyri eitt ár, tvey ár o.s. fr. til og við 5 ár fram?
   Hvørjar eru tær fíggjarligu avleiðingarnar av virkisætlanini (og fyri hvønn)?
4. *Hvørji tiltøk eiga annars at verða sett í verk fyri at røkka ein veruligan málsetning, bæði nú og í framtíðini?*

*Í tilráðingini frá nevndini verður biðið um, at virkisætlanin inniheldur eina fullfíggjaða ætlan um, hvussu tryggjað verður, at talan verður um flest allar lærarar og lærugreinir á tí einstaka skúlanum, og hvussu mannagongdin áhaldandi kann halda fram/mennast. Biðið verður um, at álitið verður handað landsstýrismanninum í seinasta lagi 15. desember 1997.*

*Landsstýrismaðurin vil hervið heita á tygum um at gerast limur í KT-nevnd fólkaskúlans. Í nevndini sita annars:*

*Birgir Kruse, Føroya Lærarafelag*
*Esmar Berg, Føroya Kommunufelag*
*Regin Ellingsgaard, lærugreinaráðgevi í teld*
*Kurt Madsen, Føroya Læraraskúli*
*Petur Zachariassen, Fróðskaparsetur Føroya, formaður*
*Olaus Jespersen, undirvísingarleiðari á Lsf, skrivari í nevndini*

*Nevndin verður biðin um at koma á fund við landsstýrismannin, fyri at tosa nærri um arbeiðssetningin o.a. Fundurin verður í Sjó- og Vektarbúðini í Tinganesi, mánadagin, tann 8. september 1997 kl. 15.00.*

# 3 Verandi støða á KT-økinum

## 3.1 Inngangur

Ein partur í arbeiðssetninginum hjá nevndini er at kortleggja støðuna á KT-økinum í fólkaskúlanum í dag. Hugsað verður bæði um støðuna úti á skúlunum og um skeiðsvirksemi, eftirútbúgving og námsfrøðiligt arbeiði yvirhøvur. Eisini eigur at vera havt í huga samskifti skúlanna við myndugleikarnar, m.a. viðvíkjandi reglum, oyðubløðum og øðrum fyrisitingarligum upplýsingum.

Umframt spurnabløðini (sí niðanfyri) og ymiskt skrivligt tilfar hevur nevndin – til tess at kunna seg um ta verandi støðuna – eisini havt samband við fleiri fólk um hesi viðurskifti, m.a. hava ráðgevar í skúlaverkinum verið á hoyringarfundi saman við nevndini.

## 3.2 Spurnablaðskanning

Til tess at fáa upplýsingar um umstøður, nýtslu, útgerð o.a. á teimum einstøku skúlunum, varð eitt spurnablað sent skúlunum. Spurnablaðið er lagt við sum skjal A. Tilsamans 62 spurnabløð vórðu send út, og um 39 komu aftur. Flestu av teimum skúlum, sum ikki sendu blaðið aftur, eru í tí støðu, at har hevur at kalla eingin teldunýtsla verið.

Niðanfyri (3.3-3.4) eru gjørdar nakrar metingar og viðmerkingar við teimum svaraðu spurnabløðunum sum grundarlag.

## 3.3 Teldunýtsla og undirvísingarforrit

Fleiri av skúlunum, sum hava teldur, upplýsa, at teir hava lítlar ella ongar royndir av at nýta KT í frálæruni. Teldurnar standa antin í eini teldustovu, á skúlabókasavninum ella eisini er líka vanligt, at tær standa á lærarastovuni.

Eisini sæst, at tað eru bert 5 skúlar, sum upplýsa, at allir flokkar skúlans hava atgongd til telduna. Í flestu skúlum hava næmingarnir ikki atgongd til telduna fyrr enn í 8. flokki, í nøkrum heilt fáum skúlum verður tó byrjað í 7. flokki.

Tað eru 3 skúlar, sum hava tikið telduna upp í allar ella flest allar lærugreinir. Annars er tað í støddfrøði, kunningarlærugreinunum, serundirvísing, byrjanarundirvísing og málundirvísing, at tað er mest vanligt, at teldan verður nýtt.

Av svarunum frá spurnablaðskanningini sæst, hvørji serforrit verða nýtt til frálæruendamál í skúlunum. Flestu undirvísingarforritini eru til støddfrøði, næst er til serundirvísingina, byrjanarundirvísingina, kunningarlærugreinirnar og minst til málundirvísingina. Hesi undirvísingarforrit eru næstan øll á fremmandum máli.

## 3.4 Undirvísingarførleiki

Av tí at tað eru ov fáir lærarar, sum eru førir fyri – ella hava umstøður til – at gera nakað við telduna í undirvísingini, er teldan enn ikki vorðin vanligt amboð í nakrari lærugrein. Tann størsti parturin av lærarunum í fólkaskúlanum hevur ongantíð verið á telduskeiði, nakrir heilt fáir hava verið einaferð á telduskeiði. Á 23 skúlum hava lærarar seinastu 3 árini verið á fleiri telduskeiðum. Í teimum flestu førunum er tað tó ivaleyst soleiðis, at tað bert er tann *eini* lærarin á tí einstaka skúlanum, sum hevur verið á fleiri skeiðum.

Tað er ymiskt bæði frá skúla til skúla og eisini innanhýsis á skúlunum, hvussu væl lærararnir eru fyri í teldukunnleika, og har kunnleikin hjá lærarunum er lítil ella púrt eingin, er heldur eingin undirvísing við ella í teldu.

Flest allir skúlar hava *ein* lærara burturav at taka sær av umsjónini við teldu-útgerðini og vegleiðing.

Samanumtikið kann sigast um undirvísingarførleika, at

- @ í mesta lagi 10% av lærarum fólkaskúlans hava verið á telduskeiði
- @ flestir teirra brúka meginpartin av orkuni til at umsita og viðlíkahalda telduútgerðina
- @ í nógvum lærugreinum hevur ein skúli ongan lærara við royndum/kunnleika í teldunýtslu

## 3.5 Nakrar viðmerkingar frá skúlunum

Umframt ítøkiligar spurningar vórðu skúlarnir eisini bidnir um í spurnablaðnum m.a. at geva eitt boð upp á eina fyri fólkaskúlan gagnliga menning á KT-økinum. Niðanfyri eru nøkur brot hesum viðvíkjandi:

@ *Tá allir lærararnir á skúlanum eru "analfabetar" á teldu-økinum, er torført at hava eina ætlan at menna telduna sum amboð í skúlanum.*

@ *Eg ivist stórliga í, um hesir smáu næmingar ikki hava best av at brúka tíðina í skúlanum til annað enn teldur. Nógv børn, sum koma í 1. flokk, hava óvanliga stóran tørv á menniskjaligari kontakt, tí fleiri og fleiri børn hava elektroniskar barnagentur. Men verður tað lóggivið soleiðis, at hesi tól skulu takast í nýtslu í byrjanarundirvísingini, so fer skúlin at laga seg eftir tí.*

@ *Teir smáu flokkarnir eiga at fáa frið at læra seg lesing, skriving og rokning og onnur fak, ið hoyra aldrinum til, so teir, tá teldu- og tøknitíðin kemur, eru førir fyri at arbeiða við teldum og øðrum tøkni. Eftir tí, ið hoyrist, so stendur ikki so væl til við hesum fakum, og hvat er so at gera við teldur o.a.?*

@ *Í hesum teldutíðum eiga vit ikki at missa okkum heilt burtur og gloyma grundlærdómin (lesing, rættskriving og rokning). Fyri at fáa nyttu úr einari teldu, skal ein helst hava eina forvitan (t.d. í landalæru, søgu, støddfrøði o.m.ø.).*

@ *Talan er minni um tøkni og meira um pedagogikk.*

@ *Mest gagnligt fyri skúlan og næmingarnar er, at vit fara at tosa meira pedagogikk og minni teknikk á KT-økinum. Minstakrav má setast til hvønn einstakan lærara. Sum tað gongur nú, verða vit yvirhálaðir av næmingunum.*

***"Talan er minni um tøkni og meira um pedagogikk"***
***"Sum tað gongur nú, verða vit yvirhálaðir av næmingunum."***

## 3.6 Royndir og verkætlanir

### *Byrjanarundirvísing í lesing*

*Hallgerð Arge Hansen*, lærugreinaráðgevi hevur drúgvar royndir við at brúka teldu í byrjanarundirvísingini, einamest í sambandi við lesing. Eftir áheitan frá nevndini hevur hon skrivað eitt upprit við hugleiðingum og viðmerkingum um hesar royndir (lagt við sum skjal D). Hallgerð ger m.a. vart við, at við teldu fáa børnini høvi at skriva, áðrenn tey makta hondskriftina, tey fáa arbeitt við eini ferð, sum hóvar teimum, og tað tykist, at – við stuðuli í skemtinum – so styttist leiðin til undirskiltan týdning og abstraktión. Til ber við teldu at "avmynda" partar av veruleikanum og á tann hátt geva børnunum ein varhuga av ymiskum fyribrigdum í samfelagnum og evnum, sum eru frammi í tíðini.

## Tess-samstarvið

*Hans Eli Dahl*, lesiráðgevi hevur seinastu árini samskipað føroysku luttøkuna í tí sonevnda *Tess-Network*. Royndirnar vísa, at undir rímiligum umstøðum er hetta eitt óført amboð til skúla-, lærara- og næmingasamstarv og til eftirútbúgving hjá lærarum. Amboð skal her – umframt tað tekniska – líka nógv skiljast sum ein samarbeiðsháttur við einum hugburði, ið er neyðugur í tí „nýggja" skúlanum. Yvirskipaða endamálið er sjálvandi at fáa gongd á eina menning í skúlunum, har ið næmingar búnast til arbeiðshættir við kunningartøkni sum sjálvsøgdum luti.

Av teimum 10 skúlunum í Føroyum, sum hava teknað seg til Tess-samstarvið, hevur ein helvt ta neyðugu tøknina, sum teir nýta í næminga- og lærarasamstarvinum. Aðrir samstarva við brøvum og faksi, meðan teir *bíða* eftir tøknini. Allir hesir skúlar síggja møguleika at menna *teirra* skúla – eisini við eftirútbúgving.

Skal Tess-samstarvið í framtíðini nýtast til at fremja KT-nýtslu og skúlamenning sum heild, so krevst, at onkur í skúlaverkinum hevur samskipanina sum eina partsuppgávu, til at fyrireika samskipanarfundir, skipa fyri smærri skeiðum v.m. Eisini vegleiðing viðvíkjandi tí tøkniliga eigur at verða havd í huga.

## Umsett undirvísingarforrit

Verkætlanin *IDUN*, ið verður stuðlað av Nordisk Ministerråd, skipar á hvørjum ári fyri einum umsetingarseminari. Mannagongdin er, at tey fimm Norðurlondini koma á stevnu, har tey hava við sær tey frægastu undirvísingarforritini. Í einar tveir dagar verður kannað, hvussu forritini starva, og síðani verður atkvøtt fyri at finna tey bestu. Nordisk Ministerråd keypir rættin til tey valdu forritini og letur stuðul til, at forritini verða umsett til hini norðurlandamálini.

Fyri tveimum árum síðani blivu Grønland, Føroyar og sámar (sum máløki) bodnir við á nevnda seminar. Vit kundu velja okkum nøkur forrit (9-11), sum vit hildu hóska okkum best, og tey vit valdu, eru hesi:

| **Forrit** | **Land** |
|---|---|
| *Roknislangan* | Í |
| *Satt* | N |
| *Tolkur* | N |
| *Talandi bókin* | D |
| *Søgusmiðjan* | D/Í |
| *Myndaorðabók* | D |
| *Orð-Mynd* | S |
| *Mynd-Týdningur* | S . . . |

| | |
|---|---|
| *Teknirøð* | D |
| *Ummælari* | D |
| *Arbeiði í føroyskum* | D |

Teir tríggir lærugreinaráðgevarnir *Hendrik Jacobsen, Regin Ellingsgaard* og *Hans Eli Dahl* hava umboðað Føroyar í hesum samstarvi og standa fyri umsetingini av forritunum. Trý tey fyrst nevndu forritini eru liðugt umsett, og handbókin er í gerð. Tað verður arbeitt við hinum forritunum, og okkurt er um at verða liðugt.

## *Verkætlanin Sleipnir*

Í 1994 tóku umboð fyri Lærarskúlan og Landsmiðstøðina stig til eina verkætlan *Skoledatanet i Norden,* sum fekk stuðul frá útnorðursamstarvinum. Samstarv fekst í lag við Fróðskaparsetrið, og við hesi verkætlan vórðu lunnar lagdir til Internet-skipanina hjá skúlunum og stovnunum á Debesartrøð. Fasta 64 Kbs-linjan millum Sleipnir-knútin og Danmark varð sett til í januar 1995. Síðani hevur skipanin ment seg til í dag at fevna um 12 skúlar (heruppií miðnáms- og hægri skúlar) við leigaðari linju og uml. 20 skúlar við uppringdum sambandi (sí fylgiskjal C).

## *Heimasíðukapping millum 8. og 9. flokkarnar*

Landsmiðstøðin fyri Undirvísingaramboð og Netumsitingin á Debesartrøð skipaðu fyri eini kapping, har allir 8. og 9. flokkarnir fingu høvi til at gera bestu heimasíðuna á Internetinum. Kappingin var sett í verk fyri jól í 1996 og endaði 18. apríl 1997 við einari opnari stevnu, har teir luttakandi flokkarnir sýndu síni verk, og vinnarar vórðu funnir. 12 flokkar kring landið tólku lut.

Sum heild kann sigast, at tiltakið var sera væl eydnað, og skúlarnir høvdu gjørt sær frálíkar heimasíður, sum uttan undantak bóru boð um, at føroyskir skúlanæmingar ikki standa aftanfyri javnaldrar í øðrum londum á hesum økinum.

# 4 Fortreytirnar fyri nýtslu av KT í fólkaskúlanum

## 4.1 Nýggja fólkaskúlalógin og leiðbeinandi lesiætlan

Grein 5 í nýggju fólkaskúlalógini, sum fær gildi 1. august 1998, er um undirvísingarinnihaldið, sum *" skal vera valt og skipa soleiðis, at næmingarnir fáa líkindi at nema sær fakliga djúphugsan, høpi og heild. Í undirvísingini skulu næmingarnir hava høvi at ogna sær sannkenning og teir arbeiðshættir, ið eyðkenna einstøku lærugreinina...."*

Telda og teldunýtsla vera ikki beinleiðis nevnd í hesi grein, men av viðmerkingunum til hesa lógargrein framgongur millum annað, at

@ tað verður hildið neyðugt hjá fólkaskúlanum at geva tí uppvaksandi ættarliðnum holla støðisvitan um teldu og teldunýtslu, so at tey kunnu verða før fyri at nýta telduna sum eitt hóskandi hjálparamboð í gerandisdegnum

@ teldan er eitt natúrligt hjálparamboð í tí dagligu undirvísingini í øllum lærugreinum og verkevnum, har teldunýtsla verður hildin at vera til fyrimunar fyri uppgávuloysnina

@ við teimum samskiftis- og upplýsingarmøguleikum, teldan hevur, eru og verða frálíkir møguleikar at fjølskipa, fjølgreina og dagføra undirvísingina, og um rætt verður atborið, so kann teldunýtslan samstundis vera ein kveikjandi birtari, ið fremur menning og framgongd innan skúlagátt.

Í arbeiðinum við undirvísingarhugtøkunum næmingalagað undirvísing og verkætlanararbeiði, kann KT verða hentur stuðul í undirvísingini, tá ið hugsað verður um tørvin hjá tí einstaka næminginum.

Í leiðbeinandi lesiætlanini – yrkisliga partinum frá 1993 – er eitt kapitul *Teldan í undirvísingini* (bls.337-345), sum lýsir møguleikarnar hjá telduni sum eitt framkomið hjálpartól í undirvísingini. Nevndin kann taka undir við tí, sum har er fest á blað viðvíkjandi teldu og teldunýtslu, og hon kann staðfesta, at hesin táttur nú í uppaftur størri mun eigur at verða styrktur, tá ið menningin á KT-økinum seinastu árini verður havd í huga.

Samanumtikið eru formligu karmarnir um KT í undirvísingin í fólkaskúlanum sostatt tryggjaðir í fólkaskúlalógini, sum kemur í gildi 1. august 1998, og í

galdandi leiðbeinandi lesiætlan. Einki er tí, sum forðar, at tiltøk verða sett í verk til at menna KT í fólkaskúlanum.

## 4.2 Tøkniligar fortreytir

Tað eru serliga niðan fyri nevndu tættir, sum hava havt avgerandi ávirkan á tøkniligu menningina:

@ *menning av teldum*
(mikroprosessarin, eginteldan, hópframleiðsla, v.m.)

@ *framkomin telduforrit*
(stýrisskipanir, nýtsluforrit, protokollir v.m.)

@ *betraðar samskiftislinjur*
(fjarskiftislinjur, teldunærnet, ljósstráður v.m.)

Teldur hava verið brúktar í Føroyum síðani miðjan sekstiárini, og langt upp í sjeytiárini vóru tað at kalla bert peningastovnar, einstakar størri fyritøkur og partar av almennu fyrisitingini, sum brúktu teldur, fyrst og fremst til bókhaldsuppgávur.

Í 1979-80 komu fyrstu teldurnar (Piccolo/ABC80) inn um skúlagátt. Hesar teldur vóru fyrstu úrslitini av tøkniligu menningini nevnd í a). Við PC-telduni, sum kom í 1981, øktist ferðin nógv í hesi menning. Á fyrsta sinni kom sjálvstøðug telda við hentum nýtsluforritum (nevnd í b)) at standa á einstøkum skrivara- og skúlaborðum.

Nýtsla og útbreiðsla av teldum øktust so líðandi upp gjøgnum áttitiárini og fyrru helvt av nítiárunum. Serliga við forritum til tekstviðgerð og rokniark fingu nógv fólk nøkur stak góð amboð í hendi. Á skúlaøkinum sást ein líknandi menning, um ferðin har kanska ikki var eins stór og í samfelagnum annars. Hesi seinastu árini hava sambindingar av teldum, fyrst í nærnet, og seinni - men ikki minst - í internetið, havt ein veldugan týdning.

Betraðar samskiftislinjur (sum nevnt í c)) og til tað bílig útgerð hava seinastu 2-3 árini gjørt telduna til eitt sera hent samskiftistól. Og júst henda gongdin er áhugaverd í skúlasamanhangi, tí at samskiftið og hetta at hava góða atgongd til upplýsingakeldur, hava stóran týdning í frálæruni.

## 4.3 Førleikakrøv lærarans

Nýggja fólkaskúlalógin setir øðrvísi krøv til allar lærarar fólkaskúlans, bæði undirvísingarliga og tvørgreinaliga. Teldan eigur at verða ein natúrligur partur av øllum lærugreinum og verkætlanum í fólkaskúlanum.

Tað er sera umráðandi, at allir lærarar verða útbúnir væl og virðiliga í teldutøkni. Hvørki myndugleiki, skúli ella foreldur kunnu vera nøgd við ein fólkaskúla, ið er eins ymiskur og lærarar eru. Tað er eitt sjálvsagt mál, at fólkaskúlin skal vera einvorðin í dygd og førleika – tað eigur ikki at vera munur á, hvar í landinum næmingurin fær sína frálæru ella hvør lærarin er.

## 4.4 Altjóðagering og fjarundirvísing

Tað er umráðandi, at skúlin fylgir við menningini í samfelagnum, heruppií dugir at síggja møguleikar og er førur fyri at skilja og taka lut í tí tøkniligu altjóðageringini.

Framgongdin á KT-økinum fer óivað at menna møguleikarnar við fjarundirvísing, har næmingurin kann nýta ein fjarskiftismiðil (internet, video o.tíl.) til at fáa tilfar, samskifta við vegleiðara v.m. Væntast kann, at serliga hægri skúlar og einstaklingar kunnu gagnnýta henda undirvísingarháttin. Í tí høpi kann fjarundirvísing gerast áhugaverd hjá læraraeftirútbúgvingini. Tað kann eisini hugsast, at framhaldsdeildir, sum samstarva, nýta henda møguleika til at geva næmingum fleiri tilboð (t.d. viðv. lærugreinum ella sonevndum breytum).

Tað er tó lítið sannlíkt, at eitt heilt skeið ella stórir partar av eini útbúgving/ eftirútbúgving verður hildið einans við fjarundirvísing. Hesin møguleiki eigur at síggjast sum eitt ískoyti til aðrar undirvísingarhættir.

## 4.5 Partarnir

Í spurningunum um KT í fólkaskúlanum eru ymsir partar, sum á ymiskan hátt hava ávirkan og verða ávirkaðir, og í høvuðsheitum eru teir:

### *Løgting, landsstýri og undirvísingarmálastýri*

Við lógum, kunngerðum og reglugerðum áseta løgting og landsstýri karmar um virksemið í fólkaskúlanum. Heruppií verða fíggjarligar karmar lagdir fyri sjálvari undirvísingini og eftirútbúgving av lærarum. Undirvísingarmálastýrið hevur fyrisitingaruppgávur landsstýrisins vegna og heruppií yvirumsjón av skúlaverkinum.

## Kommunur og kommunufelagsskapir

Sambært grein 23 í fólkaskúlalógini (ll. nr. 125, 20. juni 1997) skulu kommunurnar bera útreiðslurnar av undirvísingarmiðlunum. Íløgur og viðlíkahald í telduútbúnað hjá fólkaskúlanum er sostatt eitt kommunalt mál, og kommunan hevur ábyrgd av, at skúlin er útgjørdur, so næmingarnir fáa ta undirvísing, sum lógin krevur.

Fólkaskúlin hevur skyldu til at fyrireika og fremja undirvísingina. Fyri KT í undirvísingini merkir hetta, at skúlin m.a. skal tillaga verandi lesiætlanir og bera so í bandi, at umstøðurnar viðv. hølum, tímatalvu v.m. eru nøktandi. Eitt nú merkir hetta, at telduútgerð er atkomilig hjá næmingunum.

Í áliti sínum til nýggju fólkaskúlalógina mælir løgtingsins mentamálanevnd til, at *"við atliti at fíggjarligu orkuni hjá kommununum og ivanum um, hvat ein undirvísingarmiðil er, so skal landsstýrismaðurin áseta í kunngerð vavið á undirvísingarmiðlum."* Hetta er samsvarandi § 23, 1. stk. í ll. nr. 125 frá 20. juni 1997.

## Avvarðandi stovnar

Útbúgving av lærarum fólkaskúlans fer fram á Føroya Læraraskúla. Til eftir- og víðari útbúgving av lærarum situr ein nevnd, sum samskipar undirvísingina og útvegar lærarakreftir frá ymsum stovnum, m.a. Fróðskaparsetrinum, Náttúrugripasavninum og Fiskirannsóknarstovuni. Styttri skeið verða havd á Landsmiðstøðini. Harumframt fara nakrir fólkaskúlalærarar á ársskeið á Danmarks Lærerhøjskole.

## Áhugafeløg

Starvsligu og útbúgvingarligu arbeiðsumstøðurnar hjá lærarunum verða røktar av Føroya Lærarafelag, sum bæði hevur áhuga í tí fakliga undirvísingarliga innihaldinum í skúlanum og í arbeiðsviðurskiftum lærarana. Onnur fakfeløg á arbeiðsmarknaðinum eru eisini áhugaði í, hvat ið fyriferst í skúlanum, tí at hann hevur ein stóran uppalingarligan og samfelagsligan týdning.

## Vinnulív

Endamál fólkaskúlans er m.a. at gera næmingarnar førar fyri at fara út í vinnulívið. Vinnulívið má rokna við, at skúlin hevur livað upp til sínar skyldur og hevur lært hesar næmingarnar mest sjálvsøgdu og grundleggjandi førleikar, sum skulu til fyri at kunna taka lut í vinnulívinum. Her eru mangir fakfelagsligir felagsskapir, sum hvør á sínum øki seta førleikakrøv til skúlagongd og yrkisútbúgving.

## Miðnáms- og yrkisskúlar

Hesir skúlar eru áhugaðir í, at næmingarnir eftir 9./10. flokk eru á einum búningarstøði, har teir eru førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum teir hava rokkið ávís faklig krøv, fyri at kunna sleppa inn á hesar skúlar. Ein fortreyt fyri hesum er, at næmingarnir hava kunnleika og royndir í teldunýtslu, og at teir m.a. eru nóg búnir til skynsamliga sjálvir at leita sær fram vitan við kunningartøkni.

## Einstaklingar

Eisini eru tað einstaklingar, sum eru áhugaðir í skúlaskapi, uppaling og útbúgving, ið vilja nýta teirra demokratiska rætt at ávirka skúlan og innihaldið í skúlanum. Hesir kunnu antin í almennum orðaskifti ella gjøgnum felagsskapir gera sína áskoðan galdandi, t.d. foreldur, ið hava serligan áhuga fyri, at børnini hava umstøður at fylgja við KT-menningini.

# 5 Tilmæli nevndarinnar

## 5.1 Høvuðsmál

**KT skal vera ein sjálvsagdur liður í undirvísingarheildini í fólkaskúlanum**

Umráðandi er, at tað yngsta ættarliðið fær lagt eitt dygdargott grundstøði í KT-nýtslu og fær umstøður í fólkaskúlanum til at menna sín hug til lærdóm gjøgnum KT, tí at kunningarsamfelagið, sum tað fer at virka í, setir borgarunum nýggj og øðrvísi førleikakrøv í mun til tað samfelagið, vit í dag liva í.

Við nevnda høvuðsmáli í huga hevur nevndin skipað tilmælið í nakrar partar við nøkrum *lutmálum* (L1-L11). Partarnir eru býttir upp í høvuðstættir viðvíkjandi m.a. fyriskipan, útbúgving og útgerð.

Tað er alneyðugt, at Undirvísingar- og mentamálastýrið setir upp langtíðarmál fyri KT-økið og sær til, at málini verða rokkin til ásettu tíðina, heruppií ger neyðugar dagføringar av teimum settu málunum og ásetingar av nýggjum málum.

Nevndin hevur gjørt uppskot um eina *virkisætlan*, har tíðarkarmar eru settir fyri teimum ymisku lutmálunum. Nevndin leggur dent á, at virkisætlanin er gjørd sum ein heild við eini raðfesting av lutmálunum. Til tess at fremja hesa ætlan í verki, er neyðugt, at lands- og kommunalir myndugleikar samstarva um at tryggja neyðugar karmar á KT-økinum.

Nevndin hevur eisini gjørt uppskot um eina árliga *íløgu- og rakstrarætlan* fram til 2002 fyri tey einstøku lutmálini. Dentur skal leggjast á, at nakrir tættir í rakstrarætlanini finnast í verandi skipan (t.d. í sambandi við eftirútbúgvingina og skúlabókagerð).

## 5.2 Lutmál

### *KT-depil*

**Skipað verður ein tænasta**
**– nevndur *KT-depilin* –**
**við tí høvuðsuppgávu at samskipa, umsita**
**og ráðgeva á KT-økinum vegna skúlaverkið**

Nýggi tøkniligi útbúnaðurin og øgiliga menningin á tøkniliga økinum seta nýggj og størri krøv til førleika og vilja til at stýra og samskipa øllum møguleikunum á KT-økinum. At stýra menningini merkir her, at tað er ein samskipan viðvíkjandi teimum yvirskipaðu málunum, sum sett verða til KT.

Neyðugt verður at fylgja væl við í kappingini á altjóða støði innan tøkniligu menningina fyri eisini í skúlahøpi at kunna gagnnýta KT á skynsamiligasta hátt. Meira nágreiniliga hugsar nevndin sær, at KT-depilin skal:

a) *vegleiða lærarar og skúlar* á hesum økjum:
- alment um KT í undirvísingini, undirvísingarforrit, KT-verkstað o.a.
- uppseting og íbinding av KT-skipanum
- gerð av útbjóðingartilfari og kanning av tilboðum

b) *umsita og viðlíkahalda útgerð, skráir, søvn o.a.* á KT-deplinum:
- ”ryggnetið” (ið skúlar o.o. binda seg í)
- ambætarar við felags upplýsingum, postskipan og ”ráðstevnuskipan”
- forrit, teldufløgur, handbøkur v.m.

c) *veita námsfrøðiligar tænastur KT viðvíkjandi*:
- í sambandi við fjarundirvísing
- eftir- og víðari útbúgving

d) *ráðgeva myndugleikum o.ø.*:
- fólkaskúladeild og undirvísingar- og mentamálastýri
- eftirútbúgvingarskipanini
- kommunum, felagsskapum o.o.

Sum er verða fleiri av nevndu uppgávum røktar av lærugreinaráðgevum, netumsitingini á Debesartrøð og Landsmiðstøðini; men við tí menning, sum verður á KT-økinum, heldur nevndin, at onkursvegna eiga kreftirnar at samskipast.

Tí verður mælt til at stovna KT-depilin, sum – so at siga – skal “samla træðrirnar”. Hetta kann ivaleyst gerast, uttan at skipa ein nýggjan stovn. Men skal ein tílík tænasta hava meining, kemst ikki uttanum, at størri orka skal til, bæði sum arbeiðsmegi og útgerð. Ein møguleiki er eisini, at KT-depilin verður útbygdur til ein tænastudepil hjá Undirvísingar- og mentamálastýrinum til at virka fyri allar tríggjar deildirnar í stýrinum.

### *Eftirútbúgving*

Nevndin ásannar, at ein tann mest átrokandi spurningurin til tess at fáa gongd á KT-menningina í fólkaskúlanum, er tørvurin á eftirútbúgving. Upplýsingar frá teimum innkomnu spurnabløðunum og fatanin millum skúlafólk yvirhøvur geva eina greiða ábending um, at serliga tilkomnir lærarar kenna seg ótryggar við at skula brúka teldu í undirvísingini.

**Allir lærarar fólkaskúlans fáa eitt 30 tíma KT-skeið ella uml. eina viku á telduskeiði hvør** L2

Hetta skeið kundi kanska verið nevnt ”teldukort”, har luttakarin fær heilt grundleggjandi og ítøkiliga vitan um teldur og teldunýtslu. Skeiðini eiga at verða skipað undir eftirútbúgvingini og eiga í mestan mun at verða hildin á skúlum, har skeiðsluttakararnir starvast. Hetta stimbrar námsumhvørvið á staðnum, og luttakararnir gera sínar fyrstu royndir við útgerð, sum teir fara at nýta seinni.

Hóast innihald og endamál við skeiðnum liggur nøkulunda fast, eiga skeiðini at kunna fyriskipast á ymsan hátt, t.d. sum eitt vikuskeið ella við einum seinnaparti um vikuna í tíggju vikur.

**Nakrir lærarar fáa møguleika ella skipaðar umstøður til at kunna ogna sær serkunnleika innan kunningartøkni** L3

Nevndin hugsar sær, at hesir lærarar t.d. verða knýttir at einum KT-umhvørvi í eitt skúlaár, t.d. hálva tíð, har teir taka lut í skipaðum skeiðsvirksemi og verkætlanum. Hesin møguleiki er ætlaður lærarum, sum kunnu væntast at gerast ”telduvørðar” á skúlunum. Hildið verður, at KT-umhvørvið á skúlunum verður munandi styrkt við lærarum, ið hava fingið henda eftirútbúgvingarmøguleika.

Fyri at skúlaverkið sum heild skal fáa størst møguligt gagn av hesum eftirútbúgvingarmøguleika, kann hugsast, at brúktur verður sami býtislykil viðvíkjandi luttakarabýtinum sum í eftirútbúgvingarskipanini.

Umframt nevndu skeið eiga Landsmiðstøðin og eftirútbúgvingarskipanin eisini at bjóða ymisk teldu- og KT-skeið, sum hava verið boðin higartil. Tað eigur at vera umhugsað at økja hetta virksemið, so eitt fjølbroyttari úrval av styttri skeiðum viðvíkjandi KT í undirvísingini stendur lærarum í boði - bæði við námsfrøðiligum og didaktiskum endamáli.

## *Læraraútbúgvingin*

**KT í læraraútbúgvingini verður styrkt** L4

Tað er umráðandi, at komandi lærarar fáa eitt trygt støði, bæði viðvíkjandi tí ástøðiliga og tí verkliga kunnleikanum innan KT í undirvísingini. *”Sum tað gongur nú, verða vit yvirhálaðir av næmingunum”* sigur t.d. ein skúlastjóri í spurnablaðnum frá nevndini. Dentur eigur at leggjast á, at øll lærarlesandi í minsta lagi fáa kunnleika í KT á vanligum brúkarastøði og fáa innlit í KT sum eitt námsfrøðiligt amboð í øllum lærugreinum.

Fyri at undirvísingin á læraraskúlanum skal kunna liva upp til nevndu krøv, eiga lærarar læraraskúlans at fáa møguleikar og umstøður til at ogna sær størri vitan um KT í undirvísingini.

Komandi lærarar eiga eisini at fáa ment teirra medvit um tøknifrøði sum heild og tann týdning, sum tøknifrøðin hevur í samfelagnum. Tøknifrøðiliga menningin hendir ikki í sjálvum sær, men er bundin at búskaparligum, politiskum, sosialum, mentanarligum og umhvørvisligum høpi. Tískil kunnu avleiðingarnar av tøknifrøðiligu menningini ikki skiljast uttan hesar tættir. Hinvegin ger tøknifrøðiliga menningin sítt til, at stórar broytingar eru í samfelagnum sum heild á øllum økjum.

## *Samskifti og skúlanet*

**Skipað verður eitt føroyskt skúlanet** L5

Í kunningarsamfelagnum vera møguleikar fyri øktum og munandi øðrvísi samskifti millum fólk, millum almennar stovnar og borgarar, millum virki og viðskiftafólk o.s.fr. Serliga møguleikarnir við internetinum – við beinleiðis sambandi til umheimin – hava latið "gluggarnar" upp til ein fyri tey flestu ókendan heim. Vøksturin á internettænastuni økist alsamt, og internetið gerst meir og meir heimsumfatandi. Tí er tað altumráðandi, at gjørd verður ein miðvís ætlan fyri undirvísingarverkið, soleiðis, at Føroyar kunnu vera við í menningini av internetskipanini og samstundis eisini kunna gagnnýta internetskipanina innan tíðarhóskandi altjóða útbúgvingar.

Nevndin hugsar sær, at eitt føroyskt skúlanet skal fevna um

@ ein tøkniligan infrastruktur (íbindingarútgerð, fjarskiftisleiðir v.m.), so samskifti kann vera millum skúlar sínámillum, millum skúlar og skúlamyndugleikar v.m.

@ eina skipan, har upplýsingar (undirvísingartilfar, forrit v.m.) verða savnaðar á ambætarum (netteldum).

Tá ið hugsað verður um tað stóra samskiftið, sum er millum skúlar og Undirvísingar- og mentamálastýrið, so er sjálvsagt, at alt samskiftið á tænastusíðuni viðvíkjandi fráboðanum og leitan eftir upplýsingum eigur natúrliga at leggjast inn í hesa skipan.

### Hvør skúlanæmingur og lærari fær sítt e-postnavn — L6

Gongdin innan kunningartøkni vísir, at tað gerst alsamt meira vanligt at brúka teldupost í samskiftinum manna millum. Hesin møguleiki eigur eisini at standa næmingum og lærarum í boði. Fyri at hetta skal vera gjørligt, er neyðugt at hava eitt persónligt e-postnavn, og hugsast kann, at KT-depilin umsitur eina skipan við e-postnøvnum til allar skúlanæmingar og lærarar í Føroyum.

## *Útgerð*

Skal rættilig gongd koma á KT-menningina í undirvísingini, er neyðugt við væl fleiri teldum á skúlunum. Til tess at seta ferð á íløgurnar, mælir nevndin til, at eitt hóskandi tal av teldum verður sett sum eitt mál í nærmastu framtíð, samstundis sum, at eitt ávíst ískoyti verður latið til teldukeyp í sama tíðarskeiði (sí brot um KT-grunn). Umframt sjálvar teldurnar eiga skúlarnir eisini at gera íløgur í útgerð, sum økir um møguleikarnar at gagnnýta KT í undirvísingini, eitt nú digitalt fototól og ljóslesara (sí eisini skjal D).

**Í einum 2 ára skeiði verður í miðal ein telda til hvørjar fimm næmingar (svarandi til o.u. 1250 nýggjar teldur)** L7

Hetta lutmál merkir, eftir næmingatølunum í fólkaskúlanum 1. september 1997, at tað í 2 ár skulu keypast o.u. 1050 teldur til skúlarnar – aftrat teimum o.u. 350 teldunum, sum eru í skúlunum sambært spurnablaðskanningini. Rokna vit einans tær nýliga keyptu teldurnar uppí (av t.d. Pentium slagnum), so verður tørvurin á nýggjum teldum o.u. 1250. T.d. skal ein skúli við 300 næmingum, sum frammanundan hevur 15 nýggjar teldur, tey næstu tvey árini fáa 45 teldur aftrat fyri at røkka hesum máli.

Teldurnar á skúlunum eiga at vera knýttar saman í eitt innanhýsisnet. Hetta ger tað lættari og skjótari hjá lærarum og næmingum at kunna samskifta á skúlanetinum og á internetinum.

Tað skal gerast vart við, at umframt útreiðslur til teldur og innanhýsisnet skal eisini roknast við stovningargjaldi til íbinding til internetið, ársgjald til internetveitaran (Sleipnir ella Olivant) og linjukostnaður (uppringt samband ella leigað linja). Sí fylgiskjal C viðvíkjandi internetsambandinum hjá skúlunum.

## *KT-grunnur, menningarætlan v.m.*

**Stovnaður verður ein KT-grunnur til at stuðla ymiskum tiltøkum**

Hóast tað sambært §23 í fólkaskúlalógini er kommununnar skylda at útvega undirvísingaramboðini, so eigur peningur at verða settur av á løgtingsins fíggjarlóg til ein *KT-grunn*, sum Undirvísingar- og mentamálastýrið ræður yvir. Nevndin hugsar sær, at KT-grunnurin skal kunna:

- @ veita fíggjarligt ískoyti til telduíløgur á skúlunum
- @ stuðla umseting og tillaging av undirvísingarforritum
- @ stuðla námsfrøðiligum verkætlanum á KT-økinum (t.d. granskingar-virksemi og luttøku á ráðstevnum)
- @ veita stuðul til KT-útgerð til næmingar við serligum tørvi (t.d. tól til rørslubrekað og sjónveik)

Nevndin heldur eisini, at landsstýrismaðurin við heimild í §25 í fólkaskúla-lógini kann gera av, at kunningartøkni í fólkaskúlanum kemur undir hugtakið menningarætlan, og at landsstýrismaðurin tískil útvegar neyðuga peningin á løgtingsins fíggjarlóg fyri at seta KT-menningarætlanina í verk.

Mælt verður til, at ein *serlig skipan verður fyri smáskúlar* (færri enn 15-20 næmingar) viðvíkjandi útvegan av telduútgerð. Harumframt eiga hesir skúlar eisini at fáa hjálp til uppseting og nýtslu av útgerðini.

**Eitt *samskipað innkeyp* av telduútbúnaði verður framt** L9

Viðvíkjandi útgerð heldur nevndin, at ein skilagóð loysn er at fáa samskipað innkeyp í lag. Sølufyritøkur eiga at fáa møguleika til at bjóða seg fram sum útvegarar. Av tí at hesin parturin er kostnaðarmikil, eigur samstundis at verða havt í huga, at hesin parturin skjótt gerst ótíðarhóskandi, og tískil er neyðugt við støðugum nýíløgum. Hetta er ikki ein eingangsíløga, men heldur ein neyðug føst útreiðsla í sambandi við sjálva undirvísingina og uppgávu fólkaskúlans at menna og útbúgva næmingin til samfelagið, hann kemur at virka í.

## *KT í undirvísingini*

**Ein miðvís KT-útbyggingarætlan verður løgd fyri undirvísingina í fólkaskúlanum** L10

Í uppskotinum til álit um nýggja fólkaskúlalóg sigur ráðleggingarnevndin m.a.: *"… so eigur teldan við sínum øktu møguleikum at gerast eitt natúrligt hjálparamboð í tí dagligu undirvísingini í teimum lærugreinum og verkevnum, har teldunýtsla verður hildin at vera til fyrimunar fyri uppgávuloysnina."*

Ábyrgdina av undirvísingardygdini hevur tann einstaki skúlin sambært § 3 í fólkaskúlalógini. Hetta er sjálvsagt eisini galdandi fyri undirvísingina í KT. Víst verður annars til tær almennu leiðbeiningar, sum longu eru skrivaðar um telduna í undirvísingini.

### *Mentan og tøkni*

**Ein ætlan verður gjørd fyri, at undirvísingarforrit verða umsett til føroyskt mál og tillagað føroyskan viðurskifti**

Málsliga árinið frá serstakliga enskum máli er ógvuliga stórt, og er tí neyðugt at verja um móðurmálið. Hetta kann gerast, um undirvísingarforrit verða umsett til føroyskt mál og tillagað føroyskan málbúna. Almenni hugburðurin má vera, at føroyskt tilfar, sum almennur stuðul er latin til, ella sum er gjørt av fólkum lønt av tí almenna, eigur at leggjast á skúla- og internetskipanina.

## 5.3 Uppskot til virkisætlan



## 5.4 Íløgu- og rakstraræatlan

| | | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | **KT-depil** | 200.000 | 700.000 | 700.000 | 700.000 | 700.000 |
| | **Eftirútbúgving - teldukort** | | | | | |
| 2 | Vikarútreiðslur | | 500.000 | 1.100.000 | 1.100.000 | 600.000 |
| 3 | Skeiðsútreiðslur/ fyrireiking | 30.000 | 100.000 | 160.000 | 160.000 | 90.000 |
| | **Eftirútbúgving - telduvørðar** | | | | | |
| 4 | Vikarútreiðslur | | 370.000 | 900.000 | 520.000 | |
| 5 | Skeiðsútreiðslur/ fyrireiking | 50.000 | 70.000 | 160.000 | 90.000 | |
| 6 | **Skeið fyri lærarar Læraraskúlans** | 50.000 | 100.000 | | | |
| | **Skúlanet og e-postur** | | | | | |
| 7 | Fyrireiking | 30.000 | 60.000 | | | |
| 8 | Rakstur | | 120.000 | 250.000 | 250.000 | 250.000 |
| | **KT-grunnur** | | | | | |
| 9 | Ískoyti til telduíløgur, 700 kr pr. næm. | 900.000 | 2.000.000 | 2.000.000 | | |
| 10 | Tillaging av undirvísingarforritum | 100.000 | 250.000 | 250.000 | 250.000 | 250.000 |
| | Annað | 50.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 |
| | **Tilsamans** | **1.410.000** | **4.370.000** | **5.620.000** | **3.170.000** | **1.990.000** |

### *Viðmerkingar til íløgu- og rakstraræatlan*

1. Nevndin hugsar sær, at frá 1999 eru tvey fólk í starvi á KT-deplinum at røkja tær í tekstinum nevndu uppgávur (sí fremst í 5.2 Lutmál). Lagt er upp fyri útreiðslum til umsiting, eitt nú menning og viðlíkahald av telduskipanum, linjukostnað v.m. Umráðandi er at gera eina neyvari virkisætlan fyri KT-depilin (bæði viðvíkjandi setningi og útreiðslum),

áðrenn hann verður settur á stovn. M.a. eigur at verða umhugsað, at onkrar av niðanfyri nevndu uppgávum verða knýttar at KT-deplinum.

2. Metingin av vikarútreiðslunum byggir á, at umleið 500 (av tilsamans 640 lærarum í fólkaskúlanum) taka eitt 30-tíma teldukortskeið, og at allir tímar verða lisnir sum vikartímar, sum hvør kostar 222 kr. Verða ikki allir vikartímarnir lisnir, minka útreiðslurnar samsvarandi.

3. Roknað er við 38 teldukort-skeiðum við í miðal 14 luttakarum, og at skeiðsgjaldið er umleið 13.000 kr. Útreiðslurnar í 1998 eru til fyrireikingar.

4. Metingin av vikarútreiðslunum byggir á, at í fyrstu atløgu er ætlanin at útbúgva 2x10=20 telduvørðar yvir tvey ár (1998-2000), og at luttakararnir brúka tveir dagar um vikuna í eitt skúlaár til hesa eftirútbúgving. Nevndin heldur at henda útreiðslan eigur at vera partur í verandi eftirútbúgvingarskipan fyri fólkaskúlalærarar, og at henda útreiðslan fer av vikarjáttanini til hesa skipan. So statt verður KT uppprioriterað eina tíð. Tey, sum fara á fult árskeið, kunnu t.d. taka telduvarða-skeiðini og fylla upp við ørðum skeiðum (hinar tríggjar dagarnar í vikuni). Roknað er við, at hvør vikartími kostar 222 kr.

5. Útreiðslurnar eru sambært skeiðskostnaðinum á eftirútbúgvingini. Útreiðslurnar í 1998 og lutvíst í 1999 eru til fyrireikingar.

6. Umráðandi er, at lærarar læraraskúlans fáa møguleika til eftirútbúgving innan KT.

7. Útreiðslur til fyrireiking fevna um planlegging av skipanum, kanningar av forritum v.m. Hesar fyrireikingar verða gjørdar í samstarvi við skúlafyrisitingina, KT-depilin og umboðum fyri skúlarnar.

8. Her hugsar nevndin sær, at eitt fólk burturav tekur sær av tí dagligu umsitingini og røktini av skúlanetinum, eftir at tað er farið at virka.

9. Til tess at eggja kommunum at gera telduíløgur á skúlunum, mælir nevndin til eina stuðulsskipan, har landið veitir endurgjald, ið svarar til 7*00 kr fyri hvønn næming*, treytað av, at tal av undirvísingarteldum á skúlanum er soleiðis, at í mesta lagi 5 næmingar eru til hvørja teldu. Dentur skal leggjast á, at umframt telduútgerð eru eyka útreiðslur í samband við eitt nú serliga teldustovu, serligt innbúgv og kaðal- og netinnlegging. Henda útreiðslan er ring at áseta nærri, men kann í mongum førum koma upp í 100-200.000 kr fyri ein miðalstóran skúla.

T.d. fær ein skúli við 50 næmingum og ongari teldu endurgoldið 50x700 = 35.000 kr, um hann keypir í minsta lagi 10 (=50/5) teldur til undirvísingarbrúk. Kosta hesar 10 teldurnar t.d. tilsamans 150.000 kr, svarar stuðulin til uml. 23%. Hevur skúlin 3 Pentium-teldur frammanundan, skulu keypast 7 teldur aftrat, og tá verður stuðulin uml. 33% av nýíløguni (=105.000=7x15.000).

Fyri smáskúlar við færri enn 15-20 næmingum eiga at verða gjørdar serligar stuðulsreglur.

10. Mælt verður til, at arbeiðið við at umseta og tillaga undirvísingarforrit kemur í eina skipaða legu.

# 6 Samandráttur

Nýtslan av kunningartøkni – stytt KT – er ein altavgerandi táttur í tí sokallaða kunningarsamfelagnum. Viðgerð av upplýsingum og nýtsla av framkomnari teldu- og samskiftisútgerð eru týðandi og sjálvsagdir partar í at kalla øllum viðurskiftum í einum kunningarsamfelag. Nevndin staðfestir, at avgerðin um, at Føroyar skulu vera eitt kunningarsamfelag, er tikin. Tí kunnu vit spyrja: Hvussu nýta vit møguleikarnar, sum liggja í kunningartøknini – skúlanum og samfelagnum at gagni?

Við hesum í huga hevur nevndin sett fram tað høvuðsmál, at *KT skal vera ein sjálvsagdur liður í undirvísingarheildini í fólkaskúlanum*, soleiðis, at næmingarnir koma at kenna KT sum eitt *læritól* í undirvísingini, sum eitt *samskiftistól* og sum eitt *leititól* til at ogna sær upplýsingar og vitan – samanum tikið sum eitt týðandi og fjøltáttað amboð.

Tilmæli nevndarinnar er skipað sum ein røð av lutmálum við tilhoyrandi virkisætlan, tíðarásetingum og útreiðslutørvi. Lutmálini og tey samsvarandi ítøkiligu tiltøkini kunnu í stórum bólkast eftir, um myndugleikarnir eiga at

**A.** **samskipa og styrkja serkunnleikan á KT-økinum**

**B.** **eftirútbúgva og stimbra lærarar fólkaskúlans**

**C.** **økja munandi um telduútgerð á skúlunum**

**D.** **menna námsfrøðiligu og mentanarligu tættirnar í KT-nýtsluni**

A. Í einum lítlum samfelag er tað umráðandi at samskipa og gagnnýta tað avmarkaða tilfeingi á serkunnleika. Mælt verður til at skipa eina tænastu – nevnd *KT-depilin* – við tí høvuðsuppgávu at samskipa, umsita og ráðgeva á KT-økinum vegna skúlaverkið. Heruppií er vegleiðing um uppseting av KT-skipanum, umsiting av felags ambætarum, ráðgeving um eftirútbúgving og keyp av útgerð v.m. Tá eru møguleikar at fáa betri samspæl millum serkunnleika innan teldutøkni og námsfrøði.

B. Skal rættilig gongd koma á KT-menningina í fólkaskúlanum, er neyðugt við eini miðvísari eftirútbúgving komandi árini. Mælt verður til, at allir lærarar (sum hava tørv á tí) fáa eitt 30 tíma grundskeið – eitt *teldukort* – um teldur og teldunýtslu. Eisini verður mælt til, at nakrir lærarar fáa møguleika at ogna sær serkunnleika innan kunningartøkni og kunnu gerast *telduvørðar* á skúlunum.

C. Flestu fólkaskúlar eru illa útgjørdir við teldum, og mælt verður til, at í einum 2-3 ára skeiði verður so mikið av telduútgerð fingin til vega, at *í mesta lagi 5 næmingar vera til hvørja teldu* á skúlanum. Skotið verður upp, at landskassin við einum KT-grunni veitir eitt ískoyti til teldukeyp í hesum tíðarskeiði, og at skipað verður fyri felags innkeypi.

D. KT er ikki einans útgerð, men eitt amboð, sum fær stóran námsfrøðiligan týdning í undirvísingini. Mælt verður til, at løgd verður ein miðvís KT-útbyggingarætlan fyri frálæruni í fólkaskúlanum. Dentur eigur at leggjast á, at undirvísingarforrit verða umsett til føroyskt mál og tillagað føroyskan málbúna.

Foreldur ynskja sær altíð, at teirra barn skal hava teir bestu møguleikarnar, tá ið um ræður skúlagongd og útbúgving. Jú betri er lagt í beini, tess ljósari er framtíðin. Somuleiðis eiga vit at hugsa um kunningartøkni í fólkaskúlanum. *Við at styrkja KT-nýtsluna í skúlanum og samfelagnum annars betrast framtíðarvánirnar hjá komandi ættarliðum.*

**Styrkt KT í fólkaskúlanum**
**– ein íløga í framtíð Føroya**

# 7 Fylgiskjøl

**A Spurnablað**

**B Svar upp á spurningarnar 1-18 í spurnablaðskanningini**

**C Viðvíkjandi internet-sambandinum hjá skúlunum (des. 1997)**

*Fylgiskjølini A,B og partur í C eru ikki við í PDF-útgávuni*
**(eru í tí prentaðu útgávuni frá mars 1998)**

**D Hallgerð A. Hansen: *Hugleiðingar og viðmerkingar í sambandi við at brúka teldu í byrjanarundirvísingini í lesing***

# FYLGISKJAL C (síða 1)

## Viðvíkjandi internet-sambandinum hjá skúlunum (des. 1997)

Í januar 1995 fekk netið millum stovnarnar á Debesartrøð – Traðarnetið – internet-samband við eini 64Kbs-linju (Sleipnir) til Danmarkar. Síðani hava eisini skúlar og skúlamyndugleikar so hvørt fingið internet-samband ígjøgnum Sleipnir-knútin. Hjálagda strikumynd vísir eina heildarmynd av tøkniliga internet-bygnaðinum í Føroyum við bæði Sleipnir og Olivant, sum er internet-tænastan hjá TFL. Hjá skúlunum eru tveir hættir fyri internet-sambandi: *leigað 2-tráðað samband og uppringt samband.*

**Leigað 2-tráðað samband**
Sum er hava hesir 9 skúlar og skúlamyndugleikar fast samband við internetið um eina leigaða 2-tráðaða linju til Sleipnir-knútin:

| | |
|---|---|
| Studentaskúlin í Hoydølum | Venjingarskúlin |
| Handilsskúlin í Tórshavn | Læraraskúlin |
| Sjómansskúlin | Landsmiðstøðin |
| Maskinmeistaraskúlin | Landsskúlafyrisitingin |
| Fólkaháskúlin | Eysturskúlin |
| Tekniski Skúliní Tórshavn | Argja Skúli |
| Sankta Frans Skúli | |

Eisini hesir stovnar/deildir hava havt leigað 2-tráðað samband til Sleipnir-knútin: *Fornminnissavnið í Hoyvík, Býarbókasavnið, Norðurlandahúsið og Søgu- og samfelagsdeild setursins (í J.C. Svabosgøtu).*

Okkum vitandi hava tveir skúlar (Handilsskúlin á Kambsdali og Tekniski Skúlin í Klaksvík) fast samband (2-tráðað) við Olivant-skipanina hjá TLF.

Teir beinarar (routers), sum vit á Sleipnir-knútinum higartil hava brúkt til 2-tráðaðu sambondini við skúlar og stovnar, eru avlagdir PC-arar við forritinum Routess. Sum heild hevur henda skipan verið ein góð og bílig loysn, men til tíðir hevur staðist nógv putl av at fáa teir at virka. Nú eru felags sergjørdir beinarar (sum hava verið rættiliga kostnaðarmiklir, m.a.Cisco) farnir niður í prísi. NET-umsitingin hevur tí gjørt av at keypa ein nýggjan 8-portur felags beinara í Sleipnir-knútinum, og umhugsað verður í løtuni, hvør útgerð skal vera úti á skúlunum. Ein møguleiki er at seta eina teldu upp, sum bæði kann fáast at virka sum beinari, proxy, cache og firewall við einum hóskandi forriti, t.d. WinGate ella CSM Plus.

**Uppringt samband**
Sum frálíður hava einir 20 skúlar (umframt teir omanfyri nevndu) brúkt møguleikan at fáa internet-samband við at ringja upp til Sleipnir-knútin. Uppringingar-knúturin á Netumsitingini hevur einans 4 mótøld, men hetta hevur rokkið, tí at teir flestu av teimum „tungu“ brúkarunum hava fingið fast samband (2-tráðað), so hvørt nýtslan er vaksin. Harumframt munnu fleiri brúkarar aftra seg nakað, tí at uppringing til Sleipnir kostar eins nógv og vanlig telefon.

**Viðmerkingar**
Allir skúlarnir, sum higartil eru fast íbundnir Sleipnir-knútin, halda til í Havn. Ein høvuðsorsøk til, at eingin skúli uttan fyri Havnina hevur fast samband við Sleipnir-knútin, er kostnaðurin av eini 2-tráðað linju, sum krevur millumstaðar samband. Har eigur at vera umhugsað einhvør útjavningar-/ endurgjaldsskipan.

Ein fortreyt fyri, at eitt fast samband gevur meining, er at skúlin hevur *nærnet*, í minsta lagi soleiðis, at fleiri teldur kunnu vera á internetinum samstundis. Fleiri størri skúlar hava ikki enn gjørt neyðuga útbygging til at fáa fast internet-samband. Her tosa vit um eina rættiliga stóru íløgu fyri t.d. ein fólkaskúla, har kommunan/kommunurnar skulu gjalda.

Samanumtikið stendur á undirstøðukervinum (infrastrukturinum) bæði viðvíkjandi útbygging av linjusambandinum til skúlarnar og viðvíkjandi neyðugum íløgum á sjálvum skúlanum. Men tað er eisini stórur tørvur á kunnleika og royndum hjá teimum, sum vara av øllum hesu (lærarum, umsitarum o.ø.). Tær báðar internet-tænasturnar í Føroyum – Sleipnir og Olivant – eiga at skipa soleiðis fyri, at undirvísingarøkið í síni heild fær góðar sømdir, og at tær íløgur, sum verða gjørdar í hesa tænastur, eisini koma hesum partinum av samfelagnum til nyttis.

Óli Simonsen, NETumsitingin, Debesartrøð
Petur Zachariassen, Teldudeildin, Fróðskaparsetrið

# FYLGISKJAL D
síða 1/2

**Hallgerð Arge Hansen:**

## *Hugleiðingar og viðmerkingar í sambandi við at brúka teldu í byrjanarundirvísingini í lesing*

Tað er avgerandi fyri, hvussu barnið ognar sær lesiførleikan, at arbeitt verður við uppliving og samtalu út frá kendum evnum, hendingum og teksti. Her kann teldan gerast eitt gott amboð.

Eitt er, at lærarin kann brúka telduna at evna til tann tekst, børnini koma við. Eitt annað er tann motivatión og tað virkni, sum verður skapað, tá ið børnini sita við telduni og royna seg. Men motivatiónin hjá børnunum at læra, og innlitið hjá læraranum í, hvar og hvussu hann skal styðja, er avgerandi.

Á teldu fáa børnini skrivað, so tað er lesandi, áðrenn tey makta handskriftina. Tey kunnu sjálv gera av stødd, hall og fráleika, og tey kunnu velja stórar ella smáar bókstavir, og áðrenn tey hava lært øll hesi hugtøk, kunnu tey arbeiða við teimum, og úrslitið er so vakurt, sum var tað prentað. Soleiðis verður teirra fatan av skrivaðum teksti styrktur, tí hann broytist ikki sum handskriftin, men kemur fram á skíggjan á sama hátt hvørja ferð. Harafturat kunnu tey brúka bindindi og orku at orða og stava, tað stimbrar motivatión og sjálvvirksemi. Tá ið tey skriva á teldu, er einki árin av rangmynstri, tí tá verða ikki rørslulig mynstur skapað í heilanum, sum við handskrift, tí kunnu tey gera so nógvar royndir, teimum lystir.

Børnini fáa skrivað, koyrt burtur, skift um og angrað. Tey fáa telduna at gera tað, tey vilja, tí menna tey sjálvsálit og motivatión av hesum royndum og gerast vandin. Teldan blandar seg heldur ikki uppí, og tey fáa arbeitt so skjótt ella seint, sum teimum lystir. Samstundis ber til at arbeiða bæði sjálvstøðugt ella saman við øðrum. Størsti fyrimunurin er, at tú beinanvegin fært eitt aftursvar. Ein annar fyrimunur er, at børnini kunnu endurtaka eina arbeiðsuppgávu so ofta, teimum tørvar. Teldan eggjar og brúkar fleiri sansir samstundis, og kann heita á skemtisansin hjá børnunum. At menna skemtisansin kann vera byrjan til ikki bara at skilja tann beinleiðis ítøkiliga týdningin av eini mynd ella søgn, men byrjandi fatan av tí undirskilta týdningi, hetta at lesa millum linjurnar, sum er eitt fet fram ímóti tí, at skilja ein meira abstraktan tekst. Tey fáa eisini møguleika at endurskapa veruleika út frá teirra egnu fortreytum. Hetta bæði ger tey nøgd og hjálpir teimum at generalisera hugtøkini.

Tað er av stórum týdningi, at børn uppliva veruleikan og fáa nógvar upplivingar, so tey bæði fáa varhugan av og kensluna av ymiskum, men hesi árin festa seg bara, um barnið viðger tey út frá egnu fortreytum og grundarlagi, og tað gera børn t.d. við skapandi virksemi sum at modulera, dramatisera og tekna. Tey kunnu tekna tað á teldu ella í hond og so skanna myndina, tey uppliva út frá egnu royndum og vitan, og so endurskapa tað í skrift. Góð úrslit eggja børnini til at góðtaka eina nýggja avbjóðing. Vilja børnini fáa fleiri avbjóðingar, læra tey meir.

# FYLGISKJAL D

síða 2/2

Tað ber til at taka evni inn, sum eru frammi í tíðini og fáa viðgørt dagin í dag m.a. við at brúka digitalt myndatól, videoupptakara og stikk til sjónvarp, og t.d. fáa viðgjørt tað at fara á fjall og fletta, og so brúka ljóð, myndir og tekst samstundis.

Tað at brúka aktuelt tilfar merkir eisini, at tú fært viðgjørt mentanarlig evni bæði við at geva kunnleika og viðgera hetta málsliga. Á henda hátt fært tú bæði givið barninum trygga medvitan um okkara tjóðareyðkenni og mentan. Og ofta hendir tað, at børn, sum ikki eru so stinn í tí, skúlin spyr eftir, duga væl at fara í telduna og hava eina stóra vitan um hesi evni. Hetta gevur teimum sjálvsálit, at vit fáa eyga á teirra vitan, sum vit ikki fyrr hava vita um.

Góðir møguleikar eru esini at eygleiða børnini, meðan tey sita við telduni. T.d. brúka tey báðar hendur? Hvat siga tey, meðan tey arbeiða? Hvussu er arbeiðslagið? Tá ið tey sita við eini myndasøgu, duga tey tá at hugsa sær til tað, sum fer at henda, men sum tey ikki síggja? o.s.fr. Út frá hesum leggja vit so undirvísingina til rættis, og laga uppgávuna til teir ymisku næmingarnar.

Á telduni eru góðir møguleikar hjá børnunum at læra seg tað grundleggjandi, t.d. tøl og bókstavir. Her eru góðir møguleikar at sameina báðar lærumeginreglurnar „Top down“ og „Bottom up“, við at velja, bera saman, generalisera, meta um og rætta, og so aftur seta partarnar í tekstin. Hetta víðkar um tekstfatanina. Her eru eisini góðir møguleikar at menna málið.

Alt liggur frammi á skriviborðinum, og um tú fert frá hesum eina løtu, so er lætt at taka tað fram aftur. Tú kanst eisini brúka oyrnatelefonir og tí sita inni í stovuni og lurta o.a. og kortini ikki órógva hini. Teksturin, tey skriva, kann setast í orðabókina (sum er í forritinum), og síðani rætta tey orðabókina eftir øðrum orðabókum, tí fleiri gluggar kunnu vera frammi samstundis. Síðani rætta tey tekstin.

**Viðmerkingar**

Tað tekur langa tíð at gera teldusøgur við myndum, ljóði og uppgávum. Viðvíkjandi telduni, so tarnaði tað nógv, tá ið programmini ikki eru í lagi, teldusøgurnar ikki eru lidnar til tíðina, lærarin ikki er í skúlastovuni, áðrenn tímin byrjar og frammanundan og hevði sett verkstøðini upp á talvuna og gjørt teldurnar klárar. (Nú hugsi eg um 1. flokk.) Tú skalt eisini hava stundir til at seta teg við børnunum við telduna og styðja og stuðla teimum, so tey flyta seg frá at gera royndir t.d. við *Kid Pix* til eisini at skriva á telduna.

Men bæði forrit tú sjálv gert og liðugt gjørd forrit eru ikki altíð líka lærurík. Tí er neyðugt at læra seg at hugsa teoretiskt og meta um, hvør dugur er í hesum undirvísingartilfari og eisini, hvussu tilfarið er málsliga. Er hetta tilfar einans mekaniskt? Ella er tað dynamiskt? Ella er tað dialektiskt, so tey læra í einum samanhangi, sum gevur meining? Eru møguleikar at royna aðrar leiðir, tá ið uppgávan ikki eydnast? Er hetta ein lærutilgongd, sum hugsar um aðrar leiðir og møguleikar sum so? Fáa næmingarnir høvi til at viðgera tilfarið út frá engum fortreytum og royndum, so fata tey tilfarið, og minnið verður styrkt. Fáa tey møguleika at tillaga sær tilfarið? Vera stundir til at skifta orð um tilfarið og tilgongdina og meta um tilfarið og tilgongdina?